# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tjóðveldi og Samband helst í fólkatingið

- hvar er Javnaðarflokkurin!

Val verður til fólkatingið 13. november. Orðaskiftið í donsku miðlunum snýr seg um heimligar politiskar spurningar frá morgni til myrkurs. Av tí at valstríðið er bert knappar tríggjar vikur drúgt, telur hvør tími í valstríðnum fyri tey uppstillaðu.

Høvuðsspurningurin til danska valstríðið er enn einaferð útlendingamálið, har Anders Fogh Rasmussen spældi eina politiska fintu dagin fyri hann útskrivaði valið. Púra óvæntað lovaði hann barnafamiljum, sum í áravís hava búð á donskum flóttafólkalegum at búseta og útbúgva seg uttan fyri legurnar. Soleiðis hálaði forsætisráðharrin lætt og elegant tenninar út úr mótstøðufólkunum, ið høvdu sæð fram til at brúka innistongdu og sálarliga niðurpíndu barnafamiljurnar til valskjúts. Við at nokta hesum neyðars flóttafólkum at arbeiða í Danmark gjørdi hann samstundis frilluni Piu Kjærsgaard til vildar.

Vælferð er eisini høvuðsevnið í danska valstríðnum, har Helle Thorning-Schmidt hevur sett sær fyri at seta vælferðina upp ímóti nýliga samtykta skattareforminum. Vælferðaorðaskiftið snýr seg eisini um hægri løn til tey lægstløntu almennu starvsfólkini, og innan heilsuøkið er tað serliga krabbameinsviðgerðin, sum verður umrødd í valstríðnum.

Hvussu sær so politiska landakortið út! Eingin av vongunum tykist fáa meiriluta. Leikluturin hjá Dansk Folkeparti er nógv kølnaður, nú Nýggja Samgongan við Naser Khader tykist fáa nógvar tinglimir og kann harvið gerast tungan á vágskálini, um tað verður Anders ella Helle, sum fáa valdið. Við Rás 2 segði Khader, at hann heldur vil stuðla eina borgarliga stjórn og fáa munandi ávirkan. Hann útilokaði tó ikki samstarv til vinstru.

Hvussu er so stætt her heima undan valinum! Enn er valstríðið ikki byrjað. Løgið nokk, so hava hvørki Javnaðarflokkurin ella Fólkaflokkurin stillað upp enn, og hetta kundi bent á eitt ávíst máttloysi. Sambart veljarakanningunum bendir eisini nógv á, at Tjóðveldi og Sambandsflokkurin vinna fólkatingssessirnar. Sera markanta profileringin hjá Sambandinum í seinastuni kann gerast bilett bæði til fólkatingsborgina og á ovastu rók á løgmansborgini.

Tað er greitt, at fólkatingsvalið verður eitt slag av styrkiroynd undan komandi løgtingsvali. Tí kann tað undra mong, at flokkurin hjá løgmanni enn ikki hevur latið við seg koma. Tað er í hvussu er ikki nakað gott signal at senda út til veljararnar, nú flokkurin kanska meira enn nakar annar hevur brúk fyri at profilera seg og greiða veljarunum frá, hvat hann vil frameftir og stendur fyri, eftir fýra ár í óvanligari loyalitetstøðu í samgongu við borgarligar flokkar.

**Sosialurin**

## Javnaðarfloksins loysingartónar

Val



**JOHAN DAHL**

løgtingsmaður og næstformaður Sambandsfloksins

Jokari Javnaðarfloksins, John Johannesen tingmaður, eitt av høvuðsnøvnum floksins til fólkatingsvalið, hevur veruliga víst Javnaðarfloksins hugsan um ríkisfelagskapin og hvussu teir ætla loysingina, um møguleikin verður at sleppa á fólkating.

Útmeldingar hansara:

- Ein Nýggj byrjan
- Frælsur Felagsskapur
- Ein skipan, sum merkir, at danska grundlógin verður ikki longur galdandi í Føroyum.
- Vit skulu hava eina nýggja byrjan
- Ein nýggjan sáttmála um ein frælsan felagsskap, har valdsbýtið millum partarnar er ásett
- øll hesi omanfyri nevndu eru sera vælkend orð og flosklar frá loysingarsamgonguni, sum fór til samráðingar í 2000 við danir um júst "skipaða loysing" og "frælsan felagskap" og eina skipan har grundlógin ikki varð galdandi í Føroyum.

John Johannesen sær út til at hava funnið Høgna'sa og Anfinn'sa manuskript í onkrari skuffu og so tikið nøkur av teirra slogans til sín sum síni og Javnaðarfloksins.

Nú vita so allir javnaðarveljarar sum ikki vilja loysing, hvar Javnaðarflokkurin stendur og enn einferð hava vit fingið svart upp á hvítt, at Javnaðarflokkurin ikki longur er ríkisfelagskapsflokkur, men ein reindyrkaður loysingarflokkur.

Tað má verða klokkuklárt fyri hvønn einasta ríkisfelagskapssinnaðan veljara, at Sambandsflokkurin er einasta og besta alternativið at umboða Føroyar og føroyska fólkið á fólkatnigið.

Javnaðarflokkurin og restin av loysingarvonginum er ein og sama greipa - teir vilja allir avmontera hendan fyri føroyingar so gagnliga og mennandi felagskap.

Sambandsflokkurin er trygdin fyri at hetta ikki hendir.

Vel Sambandsflokkin tann 13. Novembur - hann verjir og mennir tíni rættindi sum borgari í ríkinum.

## Vinnarabreytin

Val



**HELENA DAM Á NEYSTABØ**

Javnaðarflokkurin

Føroyar skal miða eftir at vera ein sjálvberandi tjóð bæði búskaparliga, mentunarliga og stjórnarskipanarliga. Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um eina sjálvstýrislóg er eitt frálíkt grundarlag. Hetta uppskot ásetur, at sjálvstýrislógin skal staðfesta ein samstarvssáttmála – ein samveldissáttmála, sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Søgan seinastu 100 árini hevur prógvað, at einki - als einki spyrst burturúr, tá ið ein lítil meiriluti ella ein stórur minnuluti við ógvusligum orðadrátti ætlar at at trýsta einar sjálvstøðugar Føroyar fram. Tað hevur ongantíð givið framburð, og fer ogantíð at gera tað.

Fólkatingssessurin skal brúkast til at slóða fyri ein um felagsskapi millum Føroyar og Danmark á jøvnum føti. Einum frælsum felagsskapi, sum gevur Føroyum møguleika fyri at virka sjálvstøðugt millum onnur lond. Er grundlógin ein forðing fyri hesum, ja, so má hesin spurningur loysast við støði í tí arbeiði, sum stjórnarskipanarnevndin hevur gjørt.

Tíverri mugu vit siga, at eisini hetta seinasta valskeiðið hava okkara fólkatingsumboð drigið føroyskar ósemjur niður á røðarapallin í Fólkatinginum, og fløkt føroyskan og danskan politikk saman, heldur enn at slóða fyri semjum.Tað er taparalyndi út um alt mark.

Javnaðarflokkurin ætlar sær inn á vinnarabreytina.

## Gjald fyri valgreinar

Fram til valini komandi, fólkatingsvalið 13. November og løgtingsvalið 19. Januar, fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 90 oyru fyri millimeturin - tó 1,25 kr fyri fríggjadagsblaðið.
At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til løgtingsvalið.
Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

*Blaðstjórin*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.